

# At greina og tulka eina yrking

Tað er umráðandi at hava í huga, tá ið tú greinar og brúkar ein frymil, at frymilin bara er eitt hjálparamboð. Frymilin er ikki lagaður til eina ávísa yrking, tí kann tað væl vera, at ikki alt, sum er nevnt í frymlinum, er at finna í eini yrking. Brúka frymilin soleiðis, at hann hóskar júst til tína yrking og legg tað aftur at ella burturúr, sum tú heldur ella ikki heldur, er viðkomandi fyri tína greining.

***GG.*** *Minst altíð til at vísa á dømi í yrkingini og at grund geva fyri tínum uppáhaldum.*

Nøkur orð og hugtøk í frymlinum eru litað *blá* og skrivað við skákskrift. Í høgra bredda standa orðafrágreiðingar til hesi orð og hugtøk.

## Byrjan

Les yrkingina fleiri ferðir ígjøgnum.

- Les hana innantanna og les hana upp
- Kanna ókend orð í orðabók
- Greina fløkjasligar setningar

## Um tekstin

Greið frá tí, sum tú veitst um yrkingina, so sum

- hvør hevur skrivað hana
- nær hon er skrivað og givin út
- forlagið, sum gav út
- hvørjum hon er ætlað (móttakari)
- hvør ætlanin er við henni (slag av yrking og endamál)

© Lydia Didriksen og Nám

## Kjarnin

Greið frá, hvør kjarnin í yrkingini er (t.e. innihaldið stytt til fáar reglur).

## Bygging og innhald

- Hvussu er yrkingin bygd upp ella sett saman? (Er hon t.d. býtt upp í ørindi, ella er hon ein heild?)
- Er hon *klassisk* ella *modernað*?
- Er yrkingin *lýrisk* ella *episk* ella bæði?
- Hvat verður yrkt um? T.d. kenslur, huglag, fosturlands- ella náttúrualsk, persónar, persónlig sambond, politikk, samfelagslig viðurskifti, átrúnað, ella sigur yrkingin kanska eina søgu?
- Hvat sigur heitið á yrkingini um innihaldið?
- Minst til at kanna endan á yrkingini. Har sæst ofta ein samanumtøka ella ein niðurstøða.

## Røddin í yrkingini

- Er røddin óbeinleiðis (eingin persónur) ella beinleiðis til staðar í yrkingini t.d. sum eitt *eg* ella sum ein 3. persónur *hon* ella *hann*?
- Vendir frásøgu fólkið sær beinleiðis til lesaran ígjøgnum eitt tú?

## Tíð og stað

- Kanna, um yrkingin er knýtt til ávísa tíð ella tíðarskeið.
- Kanna, um yrkingin er staðbundin.

## Snildir og mál

- Eru *rím* í yrkingini?
- Eru *endurtøkur* av ávísum orðum ella setningum?
- Hvørjar orðaflokkar er dentur lagdur á?
- Eru serlig orð í yrkingini?
- Eru *jalig* ella *neilig* orð, ið hava týdning? T.d. lýsingar-, navn- ella sagnorð
- Hava orðini *hjátýdningar*? Ella eru tey *ítøkilig*?
- Er myndamál nýtt í yrkingini?
  - *Myndburðir*?
  - *Samanberingar*?
  - *Sálarkveiking*?
  - *Persónsgerð*?
  - *Ímyndir (symbol)*?

Eru mótsetningar í innihaldinum? Gev tær far um *grafisku myndina*. Kanna teknsetingina. Er hon vanlig? Hvat skapar rytmuna í yrkingini?

**Orðafrágreiðingar**

*Klassisk yrking:* er ofta ein yrking úr eldri tíð og er eyðkend av reglubundnum rímum

*Modernað yrking:* er ofta ein yngri yrking, ið er yrkt í fríum formi (fá ella eingi rím) og hevur ofta persónligt myndamál.

*Lýrisk yrking:* kensluborin yrking, ið lýsir kenslur og huglag.

*Episk yrking:* frásøgukend yrking.

*Rím:* Dømi um *heilrím* (tað at bæði sjálvljóð og eftirfylgjandi hjáljóð bera upp á rím): orð – norð.

*Hálvrím* (tað at bert sjálvljóð bera uppá rím): tók – bót.

*Endarím* (endaorðini á reglunum ríma): Sirmar á götu – skýmir á fløtu.

*Stavrím* (tá fleiri orð byrja við sama hjáljóði): Bert er bróðurleyst bak.

*Krossrím* (onnur hvør regla rímar – abab – eisini nevnt *flættirím*).
Dømi úr yrking eftir Hans A. Djurhuus:
eg elski tíni eygu, tey droymandi ***bláu***, a
eg elski tínar varrar, teirra fríska reyða lit b
tær góvu mær so mangan ta fagrastu ***góvu***, a
ið styrkir og vekur bæði vónir og vit. b

*Endurtøkur* (verður brúkt í yrkingum og tekstum fyri at leggja herðslu á og skapa rytmu):
Dømi úr yrking eftir Hans A. Djurhuus:
eg elski tíni eygu, tey droymandi bláu,
eg elski tínar varrar, teirra fríska reyða lit

*Jalig orð* (orð við positivari merking - eisini nevnd pluss-orð): fittur, eygnasteinur, hálova og rósa.

*Neilig orð* (orð við negativari merking - eisini nevnd minus-orð): óreinur, bartrog, sleyga og baktala.

*Hjátýdningur* (eisini nevnt konnotatión): eykamerking, t.d. bartrog fyri mann.

*Ítøkilig orð* (eisini nevnd denotatión): nevtral orð uttan eykamerking, t.d. maður.

*Myndburður:* Flyting av orði úr einari flokking í aðra, soleiðis at orðið fær eina flutta merking. Dømi: Hann er ein arbeiðshestur.

*Samanbering:* Skúlin er sum eitt fongsul.

*Sálarkveiking:* Náttúra og lutir hava menniskjansligar eginleikar. Dømi: Kavafonnin grætur.

*Persónsgerð:* Hugtøk fáa menniskjansligar eginleikar. Dømi: Deyðin við líggjanum kom.

*Ímynd* (eisini nevnt symbol): Dúgvan er ímynd ella symbol fyri frið.

*Grafisk mynd* (uppsetingin av yrkingini): Ein yrking kann vera sett upp á serligan hátt, so uppseting og inni hald smelta saman. Dømi:

Eg
Er eri
Eg eri eitt
Eg eri eitt jólatræ
Eg

© Lydia Didriksen og Nám

## Tulking og tema

Tak saman um tað, sum tín greining vísir. Vert er at geva hesum serligan ans, tá ið tú tulkar:

- Heitið á yrkingini
- Hjátýdningar, ið eru knýttir til serlig orð
- Myndamál, ið kann skiljast í fluttari merking
- Mótsetningar og stríð
- Samanbrestir og tvídráttir
- Hvat snýr yrkingin seg í veruleikanum um?

## Millumtekstleiki

Er nakað millumtekstasamband í yrkingini?
Kennir tú aðrar tekstir (søgur, myndir, filmir ella annað), ið viðgera sama evni? Greið frá teimum.

## Boðskapur/hugburður

Hevur yrkingin ein serligan boðskap til lesaran?

## Tín hugsan

Hvat heldur tú um hesa yrkingina? Grundgev fyri tínum sjónarmiðum. Er yrkingin viðkomandi fyri okkum í dag? Hví/hví ikki?

© Lydia Didriksen og Nám